# Sendistovan í Reykjavík er stig rætta vegin

JÓANNES EIDESGAARD
løgmaður



**Uttan mun til nógvu royndirnar hjá Høgni Hoydal at fáa málið um Sendistovu Føroya í Reykjavík at venda negativt, so skal tað ikki eydnast honum. Hann má gjarna leggja mín persón undir bæði líkt og ólíkt í samband við hetta mál, og hann má gjarna fremja fleiri karaktermorð á meg á vegnum, men søgan um sendistovuna í Íslandi verður verandi ein góð søga. At siga og halda nakað annað er beinleiðis óseriøst**

Boðskapurin um, at landsstýrið nú fer at seta føroyskan sendimann í Reykjavík verður væl móttikin allastaðni. Hóast tað, so hevur Høgni Hoydal ótroyttiliga roynt at sáa iva um alt málið, men serliga um mín leiklut í málinum. Men tað fer nú ikki at eydnast honum, tí øll, sum bert hava fylgt eitt sindur við gongdini í málinum vita, at í hesum málinum stóðu vit fyri einaferð skyld øksl móti øksl. 32 atkvøddu fyri hvørki meira ella minni.

**Hvat segði Løgtingið?**
Tá málið fór í Fíggjarnevndina í samband við, at fíggjarlógaruppskotið fyri 2007 var til viðgerðar, legði eg ein tekst við, sum var soljóðandi:

*"Í sambandi við, at Hoyvíkssáttmálin er komin í gildi, eru vit nú komin til, at tað er av stórum týdningi, at føroysk sendistova verður sett á stovn í Íslandi, sum kann hjálpa føroyska vinnulívinum og føroysku almennu skipanini á staðnum. Tískil hevur Landsstýrið avgjørt at seta eitt sendiumboð við somu tign, sum okkara sendimenn í Brússel og London, í Íslandi. Sendiumboðið verður partur av donsku attachéskipanini og fær innivist á donsku sendistovuni í Reykjavík."*

Í hesum teksti skal lesarin leggja til merkis tvær orðingar. Onnur er, at sendiumboðið skal hava somu tign sum okkara sendimenn í Brússels og í London. Hin er, at sendiumboðið fær innivist á donsku sendistovuni í Reykjavík.

Henda tekst tók meirilutin í fíggjarnevndini orðarætt til sín. Tað væntaði eg sjálvandi, tí vit eru jú í samgongu. Men eisini minnilutin (Páll á Reynatúgvu, Karsten Hansen og Kári P. Højgaard) tók orðarætt hesar orðingar við í teirra parti av álitinum. Og tað var eg sjálvandi rættiliga væl nøgdur við.

Tá ið henda orðing sum partur av uppskotinum um at játta pening til sendistovuna kom til atkvøðugreiðslu, atkvøddi eitt samt ting fyri uppskotinum. Og í hesum samda tingi sat eisini Høgni Hoydal, sum sostatt hevur tikið undir við orðingini um somu tign og orðingini um innivist á donsku sendistovuni.

**Hvat merkir tign/hvat merkir innivist?**
Sendiumboðið skal hava somu **tign** sum sendimenninir í London og Brússels. Tað merkir, at sendiumboðið fær diplomatstatus við teimum rættindum, sum tað gevur. Hetta hevur týdning, skal full nytta fáast av hesi íløgu.

Men fyri at fáa hesa tign ella diplomatstatus mugu vit formliga vera knýtt at donsku sendistovuni, tí við ríkisrættarligu støðu okkara, er tað danska uttanríkistænastan, sum borgar fyri hesari tign. Øll slík viðurskifti eru skipað sambært sonevnda Wiener-sáttmálanum, ið einans fevnir um sjálvstøðug lond.

So skulu vit liva upp til samtyktina hjá einmælta Løgtinginum, mugu vit í eitt formligt samstarv danir. Hetta verður eisini gjørt.

Viðvíkjandi innivistinum, so vildi Høgni Hoydal eisini, at føroyska sendistovan skuldi hava innivist á donsku sendistovuni. Og Høgni Hoydal var jú ikki vanur við annað. Í hansara tíð sum varaløgmaður setti landsstýrið sendistovuna í London á stovn, sum bókstaviliga fór og framvegis er undir veingjabreiðinum hjá donsku sendistovuni. Tær eru undir somu lon. Tað er eisini galdandi sendistovuna í Brússels.

Men við Fámjinsskjalinum fingu vit møguleika at húsast í øðrum hølum enn verandi danska sendistovan. Og henda møguleika ætli eg at nýta, hóast eg kanska á ein hátt gangi ímóti orðingini um innivist á donsku sendistovuni. Eg vænti tó ikki, at samgongan revsar meg fyri tað. Skuldi undrað meg, um ikki Høgni Hoydal hóast alt stuðlar mær í tí.

At vit fara fyri okkum sjálvi merkir tó ikki, at vit ikki framvegis eru formliga knýtt at donsku sendistovuna. Sambært Wienersáttmálanum og sambært Fámjinsskjalinum, so skal danska flaggið og skjaldrarmerkið geva til kennar, at tað formliga er danska ríkið. Men tað gera vit eisini í London og í Brússels. Men samstundis so flagga vit sjálvandi við Merkinum, og føroyski veðrurin kemur at hanga á húsavegginum.

Latið okkum nú heldur gleðast um enn eitt týdningarmikið uttanríkispolitiskt stig, heldur enn at niðurgera eitthvørt framtak.

# Hans Andrias pettar Nýggja Testamenti sundur

RICHARD DANIELSEN



Hans Andrias Sølvará heldur fram at ákæra jøðarnar fyri søgufalsan og at gera skriftirnar til eina lygisøgu. Nú Nýggja Testamentið.

Gamla Testamentið hevur hann í tveimum greinum viðgjørt á ein sera óhugnaligan og óseriøsan hátt. Prógvini, hann hevur frá einum fornfrøðingi og einum søgufrøðingi, eru t.d. at teir halda seg kunna vita, nær ymiskt bleiv bygt innan fyri 100 til 200 ár fyri 3 til 4000 árum síðani.

Nú er so tørnið komið til Nýggja Testamentið. Tað verður petta sundur, og teir sum skrivað hava gjørdir til søgufalsarar. Prógvini her eru at "Septuaginta", grikska týðingin av tí hebraiska Gamla testamentinum, samsvarar ikki við tann upprunaliga tekstin. So hevur hann nøkur dømi. Tvey, sum hann serliga viðgerð, eru Esaias 7,14 og Zacharias 9,9. Esaias skal ikki hava skrivað moyggj, men ung kvinna. Tað viðvíkjandi Zachariasi er, at har sum hebraiska biblian sigur - eitt dýr, sigur Septuaginta - tvey dýr, og Matteus tekur upp eftir Septuaginta, sum er skeivt eftir Hans Andriasar meining. Hatta tími eg ikki at gera viðmerkingar til. Hitt dømið, tað hjá Esaiasi, er at siga til, at um tað er rætt, at tað skuldi staðið ung kvinna har, so broytir tað ikki veruleikan, at tá ið Kristus varð føddur í Betlehem, uml. 700 ár seinri, varð hann føddur av moyggj. Hetta fortelur Matteus fyri okkum, og hann sigur frá, ikki bara út frá profetinum, men at ein eingil opinberaði seg fyri Jósefi og segði honum, at tað, sum var gitið í Mariu, var av Heilaga Andanum. Men hetta nyttar ikki at diskutera við Hans Andrias og hansara líkar um. Teir hanga seg í útgrevstrar og í orð um eitt ella tvey fyl, meðan teir ikki smæðast við at gera Matteus, Lukas og hinar til søgufalsarar, ja Lukas, sum byrjar sítt evangelium við at vísa á hvussu stóran ómak, hann hevði gjørt sær, fyri at tað skuldi vera álítandi, sum hann sigur frá. Les tey fyrstu versini í Lukas evangeliinum sjálvur, tú, sum lesur hetta. Gev tær tíð til tað!

At ósemja er millum jøðar og kristin, er ikki nakað nýtt. Størsti parturin av jøðum hava ongantíð góðtikið at Jesus, føddur í Nazaret fyri 2000 árum síðani, er Messias, sonur Guds, tí trúgva tey ikki á Nýggja Testamenti. Tað gera harímóti tey kristnu, t. v.s. øll verulig kristin trúgva á Jesus sum son Guds. Hetta er grundarlagið. Eingin kann kalla seg kristnan, uttan hann trýr at Jesus er sonur Guds. Tá ið Pætur ápostul segði hesa játting, segði Jesus: "Hold og blóð hevur ikki opinberað tær hetta, men Faðir mín, sum í himli er." Matt. 16,17. Og Paulus ápostul sigur hetta: "Eingin kann siga, Jesus er Harri, uttan í Heilaga Andanum." 1. Korintbr. 12,3. Øll tey, sum av sonnum játta hetta, verið tey jøðar ella heidningar, eru fødd av nýggjum, fyri at brúka orðini hjá Jesusi sjálvum í Jóh. Evangelii 3. kapitli. Vit mugu tí eisini ansa eftir, tá ið vit, sum Hans Andr. her, tosa um kristin, hvat eru tað fyri kristin vit tosa um. Tað eru tíverri so mong, sum bera kristinnavnið, sum vit noyast at seta spurnartekin við, um tey eru verulig kristin.

Ein lítil viðmerking til seinast.

Eg helt meg lesa ímillum reglurnar í fyrru greinunum, at Hans Andrias ikki hevur lisið bíbliuna heilt væl, tað átti at verið fyrsta fyritreytin, tá ið ein fer undir at leypa á skriftirnar. Eg haldi meg síggja tað sama nú. Hvussu hann kemur til, at Paulus einki kendi uttan "Septuaginta" er mær ein spurningur, sum Hans Andr. átti at greitt eitt sindur nærri frá.

# Framtíðar bygging í Føroyum

LEILA SOLMUNDE
formaður í MBF



Næstan dagliga hoyra og síggja vit í føroysku miðlunum, at stórar ætlanir eru um at byggja hús og íbúðir í Føroyum. Ikki bert í høvuðsstaðnum eru stórar ætlanir um bygging, men um alt landið.

Nógv verður bygt, alt frá sethúsum til íbúðarhús, og í seinastu viku frættist um lutaíbúðir sum skuldu byggjast í Leirvík. Byggiharrar og kommunur brynja seg veruliga til framtíðarbygging í Føroyum,

Í dag síggja vit byrjandi møguleikar at velja, hvussu vit ynskja at búgva. Vilja vit búgva í vanligum sethúsum, sum higartil hevur verið siðvenja, ella ynskja vit at búgva í egnari íbúð ella møguliga í eini lutaíbúð. Tað fjølbroytni sum er á byggiøkinum í løtuni, kunnu vit bert fegnast um, og vónandi síggja vit meiri til tað í komandi tíð.

Føroyar eru landafrøðiliga ikki serliga væl egnaðar til rørslutarnað fólk, og tað kunnu vit onki gera við, men ein annar trupulleiki er, at tað tíverri ikki er so vanligt at hugsa fram í tíðina m.a. viðvíkjandi atkomuviðurskiftunum, tá bústaðir hava verið umhugsaðir og bygdir, við tí úrsliti, at tað í dag eru nógvir bygningar, bæði hjá privatfólki og almennir bygningar, ið ikki eru atkomandi hjá rørslutarnaðum. Orsøkin byggir helst á, at vit sum útgangsstøði hava ringt við at ímynda okkum, at tað skal gerast neyðugt í okkara føri at hava hesi viðurskiftini í huga.

Men veruleikin er tann, at umframt, at eitt ávíst tal av børnum verða fødd rørslutarnaði, gerast onnur rørslutarnað á ungum árum, orsakað sjúku ella skaða, og orsakað tann støðugt hækkandi livialdurin, er bólkurin við gomlum rørslutarnaðum skjótt vaksandi, m.a. vita vit, at bólkurin, ið verður seinheilaskaddur vegna apopleksi er sera stórur, umleið 100 árliga, so tilsamans er bólkurin við rørslutarnaðum fólkum rættiliga stórur. So møguleikin fyri at onkur í familjuni ella í vinaskaranum gerst rørslutarnaður, er als ikki so lítil, sum ein trýr.

Í MBF halda vit tí, at tað er sera týdningarmikið at byggiharrar, arkitektar og kommunur, sum standa fyri hesi bygging, taka atlit til fysiska atkomu í framtíðini. Uttan at skula skerja frælsið hjá fólki at fáa tað húsið sum tey ynskja, kundi man hugsað fyribyrging inn í byggingina.

Vælvitandi, at tá man er ungur og frískur verður oftani ikki hugsað um trappur og atkomu sum heild, men tað forðar tó ikki fyri, at taka atlit til tað í framtíðini

Um bústaðurin skal verða egnaður til rørslutarnað, mugu ávísar treytir verða fylgdar, tá umrøður byggistandardir. Ein sannroynd er, at um hugsað verður um hesi viðurskiftir frá byrjan av, er meirkostnaðurin lítil og ongin, men um neyðugt verður seinri at gera broytingar, kann tað lættliga gerast kostnaðarmikið. Vit vita, at HTM á hvørjum ári, fíggjar rættiliga stórar upphæddir til umbygging av sethúsum. Hugsað eigur tí at verða um nøkur heilt grundleggjandi ting, sum til dømis, at allar innhurðar verða 80 cm breiðar, at ongar gáttir eru inni og at wc/baðirúm er so rúmsátt at koyristólur sleppur inn. Somuleiðis at trappurúm eru so mikið rúmlig, at møguleiki fyri trappulyftu eru til staðar, um brúk verður fyri tí seinni.

MBF heldur eisini, at tá kommunurnar eru byggiharrar og við til at fíggja íbúðarbygging, áttu tær at sett sum treyt, at byggingin er atkomulig fyri rørslutarnað. Hetta kundi verið ein trygd fyri, at øll fólk høvdu møguleika at keypa ella leiga eina íbúð, sum kommunan hevur staðið fyri at byggja, tí byggiætlanin varð væl hugsað ígjøgnum áðrenn bygt varð.